# Miðlar

Birgir Kruse
birk@email.fo



## – Eru tíðindi ikki til sølu longur?

Fríggjadagar verða journalistisku feitiærnar, Dimma og Sosialurin, sleptar. Skornar upp á køksborðinum vigaðu tær eitt pund hvør og taldu ávikavist 40 og 48 blaðsíður.

Upprunaliga vóru tað prentfólk, ið gjørdu tíðindabløð, soleiðis framíhjá. Seinni varð tað partapolitikkurin, sum vildi eiga bløðini. Nú politikkur er horvin – eisini úr bløðunum – er tað marknaðurin, ið stýrir bløðunum. Helst hevur hann altíð gjørt tað, marknaðurin.

Eins og aðrar marknaðarvørur verða tíðindi framleidd við sølu fyri eygað. Á handilshillum verða sjónligheitin og pakningurin avgerandi. Tíðindadysturin flytur á forsíðuna, har kappingarelementið er at hava best seljandi søguna. Grundtankin er omnibus, alt til øll. Fríggjadagin hevði Sosialurin munin við mest prangandi pappírinum og Dimma við skarpastu analýsunum. Hvørt pappír, sverta ella analýsa eru bestu dygdir at vinna marknaðin, vil bara tíðin vísa.

Tíðir broytast og vit broytast við. Í prinsippinum eru prentaði tíðindi altíð ein dag eldri enn elektronisk tíðindi, bara av tekniskum ávum. Eftir journalistisku viðgerðina, sum er galdandi fyri allar miðlar, skulu tíðindi á bløðum skrivast, umbrótast, sniðgevast, prentast og síðani berast út til tey, ið vilja keypa.

Elektroniskir møguleikar, ið finna sær lagaligar vegir inn í telefonir, gera pappírstíðindi alt meira krukkut og skrukkut, hóast kravið um innihald er tað sama. Content is king, sum vit siga eftir bretum. Í hesi journalistisku skiftistíð millum fornøld og framtíð er fremsta uppgáva miðlanna at sannføra okkum um, at skjótleiki ikki neyðvendigvís er tað sama sum grunnskygni, og at seinføri ikki neyðvendigvís er tað sama sum djúphugsni og redaksjonellar stundir til fakliga sannkenning.

Einasti konstantur, sum aldri er til diskusjón, er virðið á krónuni. Alt annað er til diskusjón. Eins frí og grundlógartryggjandi, sum pressan elskar at siga seg vera, eins bundin hevur hon altíð verið at marknaðinum. Tí kenst tað margháttligt at hoyra avgjørdar journalistar siga: »Nei, vit eru ikki til sølu!«

Í undirvísing á miðlabreyt havi eg onkuntíð givið næmingum eina einfalda uppgávu: »Farið oman til Astu á Vaglinum og spyrji um Dimma er til sølu. Skrivið svarið niður og komið so aftur!«

Ístaðin fyri at kasta runu eftir hvørjum øðrum og sáa iva um familju- og eigaraviðurskifti, eiga miðlarnir at halda seg til teirra dagliga yrki, sum er at skapa tíðindi. Hesa undurfullu vøru, sum eins og reklama kann flyta fjøll.

Lesarin, ið rindar fyri vøruna, varnast skjótt, um vøran vendir sær til lýsaran, heldur enn lesaran. Eingin miðil er so pínligur sum hann, ið ikki veit, hvør brúkarin er. Alramest almannamiðilin við hópin av várkátum sleppingarlombum.

Tað er í fínasta lagi við fakligum útmeldingum á øllum økjum. Men fakligar útmeldingar, sum siga at ein søluvøru bráddliga ikki er til sølu, órógvar okkum lesarar. Tað er av fríum vilja at vit velja at keypa bløðini har, sum tey altíð hava verið – til sølu.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*

# Gjalda minni enn danir

**ALMENNAR ÚTREIÐSLUR** **Hvør føroyingur betalir yvir 7000 krónur minni til almennar tænastur enn hvør dani. Men tað er stórur munur á, hvagar peningurin fer**

| Útreiðslur/íbúgva í kr. | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| Aðalfyrisitng | 15.870 | 22.360 |
| Verjumál | 0 | 4.824 |
| Rættarmál | 2.738 | 3.289 |
| Samferðsla og onnur vinnulig mál | 22.478 | 8.975 |
| Umhvørvisvernd | 2.450 | 1.586 |
| Bústaður og umhvørvi | 3.685 | 1.481 |
| Heilsumál | 19.905 | 24.234 |
| Mentamál | 3.643 | 4.989 |
| Undirvísing | 27.315 | 21.882 |
| Almannamál | 52.922 | 70.567 |
| **Útreiðslur samanlagt** | **151.026** | **158.345** |

**ALMENNAR ÚTREIÐSLUR**

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv, hvør føroyingur og hvør danskari betalir fyri almenna umsiting og almennar tænastur*

Áki Bertholdsen

Hvørt ár betalir hvør føroyingur góðar 151.000 krónur til tann almenna raksturin. Samstundis betalir hvør danskari góðar 158.300 krónur til almenna raksturin har.

Tað fortaldi Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum í Løgtinginum í gjár, eftir at Jaspur Vang, løgtingsmaður, bað hann leggja tøl á borðið, har almenna nýtslan í Føroyum og í Danmark verður samanborin.

Svarið frá landsstýrismanninum er grundað á eina greinarrøð, sum Hagstovan gjørdi herfyri, har almenni geirin í Føroyum, Danmark og Íslandi varð samanborin.

### Stórur munur

Men hóast hvør føroyingur brúkar meiri til almenna raksturin enn danir gera, er rættiliga stórur munur á, hvat peningurin verður brúktur til.

Sum tað sæst, er aðalfyrisitingin og almannaverkið í Føroyum væl bíligari enn í Danmark, men hinvegin betala føroyingar munandi meiri til samferðslu og vinnulig endamál.

Jaspur Vang, sum reisti málið, heldur, at gjøgnumgangandi vísir svarið, at tað er dýrari at varðveita eitt høgt vælferðarstøði í einum lítlum, spjaddum oyggjasamfelagi, enn í einum størri samfelagi.

Í hesum sambandi minnir hann á, at tað eru framvegis nógvar útreiðslur, sum danir rinda fyri okkum, tí vit hava ikki yvirtikið øll málsøki enn.

### Nógvur stuðul

Í Løgtinginum í gjár komu eisini onkrar metingar um, hví tølini eru so ymisk.

– Ein orsøk til, at okkara útreiðslur til samferðslu og vinnulig endamál eru so nógv hægri enn danir, er tann, at vit hava so nógvan vinnuligan stuðul til vinnuna, helt Jóannes Eidesgaard.

Her verður sipað til sjómannafrádrátt, inntøkutrygd og aðrar útreiðslur.

Jaspur Vang er samdur. Men hann heldur, at munurin verður serliga grefligur, tá ið hugsað verður um, hvussu lítið føroyingar brúka til vegir, tunlar og brýr og hvussu lítið vit brúka til at røkta tað undirstøðukervið, vit hava.

Her kann eisini vísast til samrøðu við Landsverk í Sosialinum herfyri, har víst verður á, at føroyska vegakervið er við at fella í órøkt.

– Samstundis síggja vit, hvussu høgum støðið, danska vegakervið er í við gongubreytum, súkklubreytum og koyribreytum greitt atskildum, heldur Jaspur Vang.

Tað leypir eisini í eyguni, hvussu nógv minni føroyingar brúka til almannaverkið enn danir brúka.

– Tað er somuleiðis munur á, at danska almannaverkið veitir eina betri tænastu enn føroyingar brúka, heldur hann.

### Grefligur munur

Tað leypir eisini í eyguni, at hvør føroyingur brúkar góðar 5400 krónur til undirvísing enn danir brúka.

– Ein orsøk til tað kann vera tann skúlabygnaður, vit hava við nógvum smáum skúlum, er órationellur, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Jaspur Vang sigur, at hesin munurin verður serliga grefligur, tá ið hugsað verður um, hvussu nógvir føroyingar fara uttanlands til hæri lestur, so tær útreiðslurnar hava vit heldur ikki.

– Tað eru nógv undirvísingartilboð, vit ikki hava, en kortini kostar okkara skúlaverk nógv meiri enn tað danska.

At vit ongar útreiðslur hava til verjumál er sjálvsagt, tí vit hava onga verju, men tað leypir í eyguni, at hvør føroyingur brúkar meiri enn tvær ferðir so nógv til bústað og umhvørvið enn danir gera.

Ein orsøkin til tað kann vera, at føroyingar eru kravmiklari og krevja, at hvør byggir síni egnu hús.

aki@sosialurin.fo

## Skattatrýst

Skattatrýst verður mátað upp á ymsar mátar. Vanliga skattatrýstið eru allir skattir og øll avgjøld í mun til bruttotjóðarúrtøkuna, BTÚ. Hetta eru skattirnar í mun til tær inntøkur, sum verða skaptar í Føroyum. Hugtakið Rættaða skattatrýstið, fevnir um allir skattir og øll avgjøld í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna. Tøka bruttotjóðarinntøkan er BTÚ pluss donsku ríkisveitingina og pluss tær lønir og rentuinntøkur netto, sum føroyingar forvinna uttanlands. Hetta er at rokna skattir og avgjøld í mun til allar inntøkurnar í landinum.

## Danskir pengar tryggja føroyingum lægri skatt

Skattatrýstið í Føroyum er lægri enn tað er í Føroyum.

Tað varð staðfest í Løgtinginum í gjár, tá ið Jóannes Edesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, svaraði einum spurningi frá Jaspur Vang.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at Hagstovan hevur samanborið skattatrýstið ímillum Føroyar og Danmark frá 2004 til 2008. Hesi árini var vanliga skattatrýstið í miðal 46% í Føroyum og í miðal 49% í Danmark. Føroyska skattatrýstið er tí nakað minni enn tað danska.

Sama tíðarskeið var rættaða skattatrýstið í miðal 42% í Føroyum og í miðal 50% í Danmark.

– Heildarveitingin úr Danmark hevur sostatt við sær, at føroyska skattatrýstið verður enn lægri enn tað danska, tá skattatrýstið verður roknað í mun til tøku bruttotjóðarúrtøkuna í landinum, staðfesti Jóannes Eidesgaard.

Í Íslandi var vanliga skattatrýstið í miðal 39% og rættaða skattatrýstið í miðal 42% í árunum frá 2004 til 2008, legði hann afturat